## Høllin letur upp

Leygardagin letur nýggja Badmintonhøllin í Klaksvík upp fyri almenninginum. Við hesum fær næst størsti býurin í landinum eina nýggja høll, sum stórur tørvur hevur verið á í fleiri ár. Og røddir vilja vera við, at eftirspurningurin eftir hallartímun als ikki verður nøktaður við hesi høllini. Men leygardagin verður so eitt stórt fet tikið í so máta, og tað verður markerað við fleiri tiltøkum. Dyarnar lata upp klokkan 14, og síðani verður tónleikur, skemt og ítróttur á skránni.



## Balling til ballið

Leygardagin verður stórfingin ítróttaveitsla í Runavík, tá føroyameistarnir í Formula-deildini saman við øðrum NSÍ-spælarum og –fjepparum halda ársveitslu. Nú talan er um bæði fundan føðingardag og feiran av FM-heiti er einki at ivast í, at tiltøkini til veitsluna verða nógv. Eitt av teimum meira forkunnugu er tó, at Ulrik Balling verður gestur á veitsluni. Balling spældi við NSÍ í 2002, og av fleiri verður hann mettur sum besti spælarin, ið hevur spælt í føroyskum fótbólti.

# Giofranco er vertur fyri



**Gianfranco Contri, ið tey flestu kenna sum italskan orðabókasmið, er beinleiðis orsøk til, at landsdysturin komandi mikukvøld verður spældur í Modena**

FÓTBÓLTUR
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Í komandi viku skulu Føroyar spæla undandyst í EM móti Italia. Hetta er sum rímiligt er ein spennandi uppliving. Eisini hjá teimum sum ikki hava tann stóra áhugan fyri fótbólti.

Tað eru nógvir fótbóltsvøllir í Italia, sum kunnu nýtast til ein slíkan dyst. Men spælt verður í Modena, sum er nakað miðskeiðis í Italia. At dysturin er júst her hevur eina spennandi forsøgu, sum vit kunnu greiða frá í hesi grein.

Her er tað hent, at "okkara maður" í Italia hevur verið við til at ávirka valið av vølli, soleiðis at vit hálvavegna hava heimavøll í Italia. Talan er um italiumannin Gianfranco Contri, sum í 2004 legði úr hondum eina føroyskt/italska orðabók. Hetta var í sær sjálvum eitt bragd, sum hann fekk nógv rós fyri. Hann fekk eisini M. A. Jacobsens heiðursløn fyri hetta avrik.

### Stríðst í eitt ár

Nú arbeiðir hann sum lærari uppi í fjøllunum í Modena-landslutinum nakað norðarlaga í Italia.

Framvegis er Gianfranco sera góður við Føroyar og hevur stóran áhuga fyri tí, sum hendir her. Hann var í síni tíð haldari av FF-blaðnum, og var sera fegin um at fáa tíðindi úr Føroyum á hendan hátt. Eisini harmast hann um, at tað gekk sum tað gekk við blaðnum, har hann eisini hevði áhugaverdar greinir.

Í samband við landsdystin, sum skal vera 21. november í ár í Italia, fór Gianfranco longu í fjør undir at royna at fáa dystin spældan á Braglia vøllinum í Modena, sum er landspartahøvuðsstaður í landslutinum Modena, har Gianfranco sjálvur býr.

Fótbóltsmyndugleikarnir í Modena tóku væl undir við hesi ætlan og hava stuðlað henni væl og virðiliga. Eitt fyrsta úrslit av hesi roynd var at skipa fyri einum øðrum landsdysti í Modena fyri at vita, hvussu vøllurin riggar, og tá var úrslitið javnleikur.

Hetta var ikki heilt galið og gav Gianfranco treystið til at halda á við hesum royndum, hóast hann tá metti, at tað fór at gerast rættiliga torført.

### Eisini stuðul úr Schweits

Fyri umleið einum síðani hevði Giofranco vitjan av vinum úr Schweits. Hesar hevði hann hitt í Føroyum. Teir vóru limir í sveisiska-føroyska vinafelagnum. Teir vildu eisini stuðla royndunum at fáa landsdystin spældan í Modena. Tá fór dysturin heldur ikki at vera so langt frá Sveits heldur, og tá vildi verið lættari hjá áskoðarum úr